# Skeið í rødd og rørslu

At læra at brúka rødd og kropp er alfa og omega hjá einum sjónleikara, fyrilestrarhaldara ella einum, ið á ein ella annan hátt skal bera nakað fram alment. Skeiðið miðjar ímóti at geva luttakaranum innlit í, hvussu hann kann arbeiða við at menna røddina og finna sína persónligu styrki í framferðini.

Arbeitt verður við grundleggjandi andadráttsvenjingum og kropsburði til tess at fáa samband við røddina í kroppinum. Í venjingini verður arbeitt við smáum leikbrotum grundað á klassiskar tekstir frá eitt nú Shakespeare og griksku tragedium. Luttakararnir fáa tekstin sendandi, áðrenn skeiðið byrjar.

Endamálið er at gerast tilvitaður um, at rødd og kroppur eru tengd at hvørjum øðrum. Soleiðis økist førleikin at brúka røddina rætt, og luttakarin fær innlit í, hvat hann reint kropsliga kann gera fyri at fáa eina størri nærveru í framferðini.

Arbeitt verður bæði í bólkum og við hvørjum einstøkum luttakara.

Skeiðið er fyri øll áhugaði – líka mikið um tú ert royndur ella hetta er fyrstu ferð. Hesin arbeiðsháttur tekur støði í hvørjum einstøkum, og arbeitt verður við at menna tann einstaka, har hann er beint nú.